## Lærarafelagið hús á Nesi

Stuðulsgrunnurin hevur 1. apríl í 2007 keypt eini hús á Nesi í Suðuroynni fyri 550.000 kr. Tey eru í trimum hæddum: kjallarin, miðhædd og loft við ávikavist uml. 55, 68 og 60 fermetrum. Grundøkið er 328 fermetrar. Húsini eru upprunaliga bygd í 1902, men eru høvuðsumvæld í 1997-2005. Í miðhæddini er inngongd, køkur, stova, baðirúm og trappa upp á loft, har 1 stórt og 2 smærri kømur eru umframt gongd. Í kjallaranum er vaski-, fýr- og goymslurúm. Húsini standa sera vakurt í veðurgóðum, friðarligum og barnavinarligum umhvørvi og hava frálíkt útsýni. Við tíðini er ætlanin, at fleiri hús skulu verða keypt, so at limir felagsins kunnu hava fleiri tilboð ymsa staðni í Føroyum, skrivar Føroya Lærarafelag á heimasíðu síni.



# Samtak saknar javnstøðu í løgmansrøðuni

**- Sum heild kann sigast um løgmansrøðuna, at tann stóra framgongdin er komin ávísum samfelagsbólkum ov lítið til góðar, sigur Sonja Jógvansdóttir, samskiftisráðgevi í Samtaki. Samtak rósar løgmanni fyri at nevna pensjónir, tryggingarlóggávuna og náttúruvernd í røðuni, men sigur seg m.a. sakna umrøðu av javnstøðu og tað skeiva kynsbýtið í Føroyum**

LØGMANSRØÐAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Javnstøða og øðrvísi skattapolitikkur verða helst tvey av uppskotunum, sum Samtak fer at bera út í Tinganes eftir valið. Teimum veiku bólkunum hevur Landsstýrið ikki tikið sær so væl av, ljóðar frá Samtaki*

*Savnsmynd: Jens Kr. Vang*

Í dag byrjaði Løgtingið at viðgera »frágreiðing løgmans á ólavsøku«, sum løgmansrøðan hjá Jóannesi Eidesgaard eisini verður nevnd.

Feløgini í Samtaki - Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Fiskimannafelag - halda, at røða løgmans kann býtast í tveir partar. Ein jaligan og ein neiligan.

Sum heild ber til at siga, at sambært Samtaki gjørdi løgmaður meira burtur úr »hvat« enn »hvussu«.

- Røðan bar brá av, at løgmaður skuldi siga, hvat hann hevur gjørt, sigur Sonja Jógvansdóttir, samskiftisráðgevi í Samtaki.

Hon fegnast um, løgmaður nevndi, at Landsstýrið fer at leggja fram lógaruppskot um at tryggja tímaløntum endurgjald fyri inntøkumiss í sambandi við fyrsta sjúkradag hjá barni. Somuleiðis sigur ráðgevin, at Samtak tekur undir við at skipa eitt vælferðarráð, og at stig verða tikin á náttúru- og umhvørvisøkinum.

Úr Samtaki verður eisini sagt, at tey gleðast um, at Landsstýrið arbeiðir við at loysa penssjónsspurningin, men ov lítið ítøkiligt kom fram um hetta í røðuni, metir Sonja Jógvansdóttir.

Hon nevnir eisini, at talið av ellis- og røktarheimsplássum er hækkað, men spyr samstundis, um hetta kortini nøktar og samsvarar við veruliga tørvin.

Harafturat rósar Samtak løgmanni fyri at lova at gera nakað við tryggingarlóggávuna, at bøta um støðuna hjá einligum forsyrgjarum og at koma við einum familjupakka.

### Vantandi javnstøða og útgreining av inntøkum

Hinvegin ljóðar frá Samtaki, at tey veruliga sakna, at javnstøða varð umrødd í røðuni frágreiðingini hjá løgmanni til tjóðina.

- Hetta var løgið og sigur nakað um, hvussu Landsstýrið raðfestir, sigur Sonja Jógvansdóttir um ta vantandi umrøðuna av javnstøðu í løgmansrøðuni.

Hon sigur seg eisini undrast á, at spurningurin um tær 2000 kvinnurnar, ið »vanta« í hagtølunum í Føroyum, heldur ikki varð nevndur í røðuni.

- Tað, sum eg ordiliga sakni í røðuni, eru rokningar av, hvat føroyingar tjena, og um virðini verða rættvíst býtt. Men kanska kann eitt vælferðarráð gera hetta, sigur Sonja Jógvansdóttir, sum eisini nevnir skattaviðurskiftini í Føroyum, men ásannar, at her kunnu fakfeløgini eisini taka í egnan barm fyri ikki at hava gjørt nóg nógv við hetta.

- Men ov lítið ítøkiligt varð sagt um skattaviðurskiftini, sigur hon.

Harafturat er Sonja Jógvansdóttir ivasom um at lata føroyska arbeiðsmarknaðin upp fyri útlendskari arbeiðsmegi, sum løgmaður róði fram undir í røðuni á ólavsøku. Men eisini her viðgongur hon, at fakfeløgini eiga at taka í egnan barm og nevnir m.a., at fakfeløgini eiga at at upplýsa um fakfelagsviðurskifti, rættindi og skyldur á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hesi eru evni, ið útlendingar kunnu verða lítið tilvitaðir um.

### Ynskilisti eftir valið

Eitt annað, ið Samtak metir merkir føroyska samfelagið sum heild, er, at lógaverkið er afturútsiglt í mun til okkara grannalond. Í hesum viðfangi nevnir samskiftisráðgevin m.a. almannalóggávu og. t.d. forsorgarlógina.

Men av tí at løgtingsval skal haldast í seinasta lagi í januar, væntar Sonja Jógvansdóttir, at Samtak eftir valið fer at gera sum eitt nú LO í Noregi og leggja fram ein »ynskilista« við boðum uppá, hvat fakfeløgini meta treingir til ábøtur í samfelagnum. Enn vil hon ikki nágreiniliga siga, hvussu ein tílíkur listi fer at síggja út, men t.d. kundi øðrvísi skattapolitikkur verið nevndur á einum slíkum, greiðir Sonja Jógvansdóttir frá.

- Sum heild kann sigast um løgmansrøðuna, at tann stóra framgongdin er komin ávísum samfelagsbólkum ov lítið til góðar, sigur Sonja Jógvansdóttir, ið heldur hetta serliga síggjast aftur í almanna- og skattalóggávuni.

- Teimum veiku bólkunum hevur Landsstýrið ikki tikið sær so væl av, sigur samskiftisráðgevin í Samtaki at enda.

# Samgongan stendur á gravarbakkanum

**Kári P. Højgaard, formaður Sjálvstýrisfloksins sigur, at ólavsøkurøða løgmans var sum til eina jarðarferð – alt ov ljósareyð og uttan hald í veruleikanum**

LØGMANSRØÐAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Kári P. Højgaard heldur at løgmaður reingjar veruleikan, tá hann hálovar búskaparligu framgongdini*

Kári P. Højgaard, formaður Sjálvstýrisfloksins, sigur við Sosialin at ólavsøkurøða løgmans var at sammeta við eina jarðarferð.

- Hon var sera vøkur og positiv, men manglaði realistiskan sans, sigur Kári P. Højgaard, sum vil vera við, at løgmaður málaði eina glastrimynd av veruleikanum og avrikum samgongunnar.

- Eg kenni ikki hatta aftur, sum løgmaður talar um, sigur hann, og vísir eitt nú ítøkiliga á uttanríkispolitisku heimildarlógirnar, sum hann ivast í dygdini av.

- Eisini haldi eg, at løgmaður reingjar veruleikan, tá hann hálovar búskaparligu framgongdini. Hetta samstundis sum vit hava havt ovurstórt hall á handilsjavnanum í fleiri ár, og at fíggingarmøguleikarnir hjá fólki eru broyttir somikið nógv, at alt ov nógv ferð er á búskapinum, sigur Kári P. Højgaard. Hann ynskir í hesum sambandi, at løgmaður var meira ítøkiligur í sambandi við hvussu ætlanin er at tálma ovurheita búskapinum.

Kári P. Højgaard sigur seg eisini sakna greið viðurskifti innan fiskivinnupolitikkin, og sigur nýggju skipanina við rullandi fiskiloyvum hevur havt við sær meira spekulatiónin enn áður.

- Samanumtikið ein alt ov ljósareyð røða við lítlum haldi í veruleikanum!